# Kunngerðablaðið A

2009 Hefti 7

ISSN 0907-905X


Nr. 18 20. februar 2009

**Kunngerð**
**um**
**stuðul til flutning av fiski**

Við heimild í § 3 í løgtingslóg nr. 14 frá 3. mars 1999 um stuðul til flutning av fiski, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 175 frá 21. desember 2001, verður ásett:

**§ 1.** Til flutning av fiski, livur og rogn verður eftir umsókn og skjalprógvi fyri flutningi latið fiskavirki/framleiðsluvirki flutningsstuðul í kr. fyri kilo sambært fylgiskjali 1.
*Stk. 2.* Stuðul til flutning frá landingarmiðstøð verður bert útgoldin, um landingarmiðstøðin er stað, har fiskur verður landaður, men ikki virkaður, og um fiskurin er keyptur beinleiðis frá fiskifari, uttan nakað millumlið.

**§ 2.** Til flutning av fiski, livur og rogn frá útróðrarbátum úr økjum, har eingin uppboðssøla er, verður eftir umsókn og skjalprógvi fyri flutningi latið útróðrarbátum 14 oyru/kilo í flutningsstuðli til at flyta fisk, livur og rogn til nærmastu uppboðssølu.

**§ 3.** Stuðul verður ikki latin til flutning av fiski, ið er virkaður umborð.

**§ 4.** Umsókn um flutningsstuðul skal vera Lønjavningarstovuni í hendi í seinasta lagi 2 mánaðir eftir, at flutningurin er farin fram. Umsókn, sum ikki lýkur hesa tíðarfreist, verður ikki viðgjørd.
*Stk. 2.* Stuðulin verður veittur føroyskum felag ella einstaklingi, ið er MVG skrásett/ur.

**§ 5.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá og við 20. februar 2009.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 16 frá 17. februar 2009 um stuðul til flutning av fiski.

Fiskimálaráðið, 20. februar 2009

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/Rógvi Reinert (sign.)

**Fylgiskjal 1**

| Frá/til | Eysturoy/Streymoy | Norðoyggjar | Sandoy | Suðuroy |
|---|---|---|---|---|
| Vágar | 0,03 | 0,06 | 0,16 | 0,23 |
| Suðuroy | 0,20 | 0,23 | 0,33 | |
| Sandoy | 0,13 | 0,16 | | |
| Norðoyggjar | 0,03 | | | |

## Kunngerð um broyting í kunngerð um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum fyri skip úr Noregi og ES-londum

### § 1

Í kunngerð nr. 23 frá 16. mars 2005 um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum fyri skip úr Noregi og ES-londum verður gjørd henda broyting:

Aftaná § 1 verður sett:
**„§ 1a.** Hóast ásetingina í § 1, nr. 8 er øll veiða við øllum veiðihættum hjá øllum fiskiførum bannað á Føroya Banka til og við 31. august 2009, innan fyri somu linjur drignar millum somu støð, sum ásett í § 1, nr. 8.“

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi aftur 1. september 2009.

Fiskimálaráðið, 25. februar 2009

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum

**§ 1**

Í kunngerð nr. 4 frá 9. februar 2006 um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum verður gjørd henda broyting:

Aftaná § 1 verður sett:
**„§ 1a.** Hóast ásetingina í § 1, nr. 8 er øll veiða við øllum veiðihættum hjá øllum fiskiførum bannað á Føroya Banka til og við 31. august 2009, innan fyri somu linjur drignar millum somu støð, sum ásett í § 1, nr. 8."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi aftur 1. september 2009.

Fiskimálaráðið, 25. februar 2009

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um norska botnfiskaveiðu á ytru landleiðini

### § 1

Í kunngerð nr. 47 frá 9. apríl 2003 um norska botnfiskaveiðu á ytru landleiðini verður gjørd henda broyting:

Aftaná § 3 verður sett:
„**§ 3a.** Hóast ásetingina í § 3, stk. 1, nr. 2 er øll veiða við øllum veiðihættum hjá øllum fiskiførum bannað á Føroya Banka til og við 31. august 2009 innan fyri linjur drignar millum hesi 7 støð og í hesi raðfylgju:

1) 60°50’00”N 07°57’00”V
2) 61°03’00”N 07°57’00”V
3) 61°15’30”N 08°16’00”V
4) 61°13’20”N 08°42’12”V
5) 61°00’00”N 09°11’00”V
6) 60°48’40”N 09°25’00”V
7) 60°24’00”N 09°07’00”V

tó soleiðis, at til og við 31. mai 2009 er loyvt at veiða innan fyri linjur drignar millum hesi støð:

1) 60°50’00”N 07°57’00”V
2) 60°57’20”N 07°57’00”V
3) 60°45’40”N 08°37’00”V
4) 60°36’30”N 08°45’00”V
5) 60°26’00”N 09°08’25”V
6) 60°24’00”N 09°07’00”V“

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi aftur 1. september 2009.

Fiskimálaráðið, 25. februar 2009

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Nr. 22 25. februar 2009

# Kunngerð um tíðaravmarkað veiðibann á Føroya Banka 2009

Við heimild í § 9a, stk. 2 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap verður ásett:

**§ 1.** Til og við 31. august 2009 er øll veiða við øllum veiðihættum hjá øllum fiskiførum bannað á Føroya Banka innan fyri linjur drignar millum hesi 7 støð og í hesi raðfylgju:

1) 60°50’00”N 07°57’00”V
2) 61°03’00”N 07°57’00”V
3) 61°15’30”N 08°16’00”V
4) 61°13’20”N 08°42’12”V
5) 61°00’00”N 09°11’00”V
6) 60°48’40”N 09°25’00”V
7) 60°24’00”N 09°07’00”V

tó soleiðis, at til og við 31. mai 2009 er loyvt at veiða innan fyri linjur drignar millum hesi støð:

1) 60°50’00”N 07°57’00”V
2) 60°57’20”N 07°57’00”V
3) 60°45’40”N 08°37’00”V
4) 60°36’30”N 08°45’00”V
5) 60°26’00”N 09°08’25”V
6) 60°24’00”N 09°07’00”V

*Revsing*

**§ 2.** Brot á ásetingina í § 1 verður revsað eftir § 40 í lógini.

*Gildiskoma*

**§ 3.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi aftur 1. september 2009.

Fiskimálaráðið, 25. februar 2009

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um ES-fiskiskapin á ytru landleiðini

### § 1

Í kunngerð nr. 7 frá 26. januar 1999 um ES-fiskiskapin á ytru landleiðini eftir botnfiski, sum seinast broytt við kunngerð nr. 13 frá 1. apríl 2004, verður gjørd henda broyting:

Aftaná § 1 verður sett:
**„§ 1a.** Hóast ásetingina í § 1, stk. 3, nr. 1 er øll veiða við øllum veiðihættum hjá øllum fiskiførum bannað á Føroya Banka til og við 31. august 2009 innan fyri linjur drignar millum hesi 7 støð og í hesi raðfylgju:

1) 60°50’00”N 07°57’00”V
2) 61°03’00”N 07°57’00”V
3) 61°15’30”N 08°16’00”V
4) 61°13’20”N 08°42’12”V
5) 61°00’00”N 09°11’00”V
6) 60°48’40”N 09°25’00”V
7) 60°24’00”N 09°07’00”V

tó soleiðis, at til og við 31. mai 2009 er loyvt at veiða innan fyri linjur drignar millum hesi støð:

1) 60°50’00”N 07°57’00”V
2) 60°57’20”N 07°57’00”V
3) 60°45’40”N 08°37’00”V
4) 60°36’30”N 08°45’00”V
5) 60°26’00”N 09°08’25”V
6) 60°24’00”N 09°07’00”V“

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi aftur 1. september 2009.

Fiskimálaráðið, 25. februar 2009

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

FØROYAPRENT